# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 39

Februar 2019



- Provisoriur 1919
- V. U. Hammershaimb 200 ár
- Mánalendingin 1969
- Europa 2019
- Gamlar myllur

Posta FAROE ISLANDS







Royndarprent

# Provisoriur 1919

**Stólabeinsstemplið**

Tað var kanska lagnunnar speisemi, at tað postala árinið á Føroyar (í filatelistiskum høpi) – burtursæð frá einum enskum sensuri – ikki kom fyrr enn fyrri heimsbardagi var lokin.

Men kanska júst tá varð støðan undirmett og neyvt fyrivarni varð ikki tikið, tá postali myndugleikin í Danmark gjørdi av, at posttaksturin skuldi broytast pr. 1. januar 1919 – og varð hesin m.a. lýstur í Dimmu 14. desember 1918, har vanligur brævtakstur inntil 250 Gr. fór úr 5 oyrum upp í 7 oyru. Sama var galdandi fyri landsporto fyri brævkort inntil 250 Gr. – úr 4 oyru upp í 7 oyru. (Landsporto fyri brævkort er úr Føroyum til Danmarkar).

Hetta varð avgerandi fyri tey komandi provisoriuni, har serliga 2 oyra merki komu at mangla – og her verður serliga hugt at 2 / 5 oyra yvirstemplingini, sonevnda stólabeinsyvirstemplið.

Á posthúsinum í Havn vóru tá mest týðandi funktionerarnir postmeistarin Rasmus Kristensen Pilgaard (1.06.17- 31.10.22), postekspedienturin Andreas Ejnar Emil Godskesen Andersen (6.06.17-30.04.20) og postassistenturin Laurits Diderik Hansen (1.11.18-30.04.25) og seinni sum postkontrollørur (1.07.31-31.12.46). Teir vóru sostatt allir danir, sum ráddu fyri posthúsinum tá.

Postmeistarin Pilgaard varnaðist vandan longu í desember 1918 – og fjarritaði eftir 7 oyra merkjum úr Danmark – við øðrum orðum hevði hann longu her gjørt greitt, at frímerki komu at mangla. Pilgaard varð biðin um at brúka 1 og 2 oyra merkini at uppfrankera við, tí 7 oyra merkini fóru ikki at koma til landið fyri 1. januar 1919. Tann 30. desember fjarritaði Pilgaard aftur til Danmarkar, at nú stóð illa til – frímerkjagoymslan var so at siga tóm. Svarið frá Generaldirektoratinum kom 1. januar, - at so kundi posthúsið klippa 4 oyra frímerkini í tvey og seinni somuleiðis 4 oyra krossbond,


TELEGRAM

fra Köbenhavn Nr. 15. 16/15 Ord, indl. den 11/1 Kl. 16 T. 0 M.

Adresse: Postmester Thorshavn

11 JAN 1919 THORSHAVN

THORSHAVN 13.1.19

Vedtagne Forkortelser (signes conventionnels)

D Iltelegram (télégr. urgent) | TC Anbefalet Telegram (télégr. collationné) | FS Efterscndes (faire suivre)
RP Svar betalt (réponse payée) | Aabent (ouvert): Udleveres aabent (remise ouverte) | PC Ankomstbevis bet. (accusé réception)
RPD Ilsvar ( urgente) | MP egenhændigt (mains propres) | XP Bud betalt (exprès payé)

Surcgares cipher 2 øre on necessary number of 5 øre Stamps General Postmaster

*Fjarritið við boðunum at yvirstempla 2/5 oyru kom leygardagin 11.1.19 – tí varð hesin dagurin eisini nýttur, nú Posta gav út smáark á 100 ára degnum.*

tá frímerkini vóru uppi. Tá einki varð sagt um, hvussu hesi merkini skuldu klippast, so var tað eisini ein nýggj støða. L.D. Hansen, sum eisini var frímerkjasavnari visti tó at siga, hvussu frímerki vórðu klipt diagonalt á Vestindisku oyggjunum í 1903. Hetta var so gongda leiðin eisini hesa ferð.

Goymslan gekk tó skjótt undan. Og longu 10. januar kundi Pilgaard gera støðuna upp, at hóast flestu bygdirnar høvdu nakað av frímerkjum niðurfyri, so var "kassin" í Havn nærum tómur. Sama dag fór tískil nýtt fjarrit til Danmarkar, har støðan var lýst nærri – einans 5 ørk við 4 oyra merkjum á goymslu. Svarfjarritið, sent leygardagin 11. januar, kl. 16.00 frá Generaldirekteratinum var soljóðandi: *"Surcgares cipher 2 oere on necessary number of 5 oere Stamps – General Postmaster".* Harvið var loyvið givið at yvirstempla 5 oyra merki til 2 oyra.

Tað sæst á fjarritinum, at tað er móttøkustemplað á posthúsinum mánadagin 13.1.19. 5-7 F. Tað hevur tó einki at siga fyri, nær fjarritið var borið út! Mín niðurstøða er, at ein danskur embætismaður í Havn hevur fingið fjarritið borið út sama dag, ið tað kom – t.v.s. 11.1 leygardagin um kvøldið t.d. kl. 18.00 í hesum føri. Helst hevur fjarritið verið borið út á Landavegin, har Pilgaard búði – hetta, um Pilgaard ikki sjálvur hevur givið onnur boð til Det Store Nordiske, tá hann má ætlast at hava roknað við einum týdningarmiklum svarfjarriti. Tá Pilgaard kann hugsast, at hava givið serlig boð um útbering av fjarritinum – til "varapostmeistaran" t.d., so verður hetta sagt, tí Pilgaard var í tænastuørindum á Tvøroyri, har Mortensen menn vóru í einari tilgongd at selja Smiril til Føroya Løgting – og ein slík avgerð kundi fáa stóran týdning fyri postflutningin millum oyggjarnar.

Orsakað av tænastuørindunum hjá Pilgaard, so var tað næsti maður á posthúsinum, Godskesen Andersen, ið mátti finna eina loysn.



Hann gjørdi eitt uppskot til, hvussu ein yvirstempling kundi gerast. (Eitt sovorðið uppskot – ein sokallað "essay" er myndevnið á smáarkinum, sum kemur út 11. januar 2019.) Men prentsmiðjan hjá Dimmalætting havnaði uppgávuni – helst i tíðarneyð, men tey lótu honum typirnar 2, Ø, R og E, sum kundu nýtast til eitt stempul. Við typunum fekk Godskesen Andersen snikkarameistaran Peter Poulsen at tillaga eitt skaft úr einum stólabeini, har typirnar vóru ásettar.

Soleiðis fingu vit stólabeinsstemplið, sum varð tikið í brúk mánadagin 13.1.1919, hevur Godskesen Andersen nógv ár seinni greitt frá. Eitt ark ella 100 merki vórðu yvirstemplað niðurfyri so hvørt – men ongantíð vórðu merki seld óstemplað út av posthúsinum! Tilsamans bleiv tað til 155 ørk ella 15.500 frímerki, ið vórðu yvirstemplað.

Tað finnast ikki skjøl mær vitandi, sum staðfesta, at Godskesen Andersen minnist rætt, tá hann seinni greiddi frá at 13.1.1919 var fyrsti dagur at hetta 2/5 oyra frímerkið varð brúkt. Faktiskt finst minst ein brævbjálvi, sum er stemplaður sunnudagin 12.1.1919 – men eg veit ikki at siga, um hann er ektaður, tó sunnudagin 5.1.1919 varð arbeitt á posthúsinum. So óhugsandi er ikki, at sunnudagurin 12.1 var arbeiðsdagur – tað finnast eisini fleiri aðrir brævbjálvar við øðrum frímerkjum stemplaðir henda sunnudagin.

Hesin spurningur kann standa opin her.

Tann 23.1.1919 kom s/s Botnia á Havnina – og í førningi vóru tey frímerkini, sum Pilgaard hevði bílagt.

Boðini úr Danmark vóru samstundis, at sølan av provisoriunum skuldi halda uppat - og tað gjørdi hon eisini, men bert í Havnini. Hávetur var – og tað tók fleiri dagar at fáa tey nýggju frímerkini út í hvønn "krók" – og tískil finnast hesi merkini stemplað nógv seinni. Tað seinast kenda í marts 1919, men sambært Ingvard Jacobsen, frímerkjasavnara og greinaskrivara í Norðatlantex 76, so



*Stólabeinsstemplið*

høvdu hesi frímerki frankeringsvirði til 31. desember 1926, hóast tað ongan veruligan praktiskan týdning hevði havt.

Kaga vit í bløðini fyri januar 1919, so finst ymiskt av áhuga:

Longu í Dimmu nr. 5 tann 15. januar 1919, sæst at áhugin fyri hesum frímerkjum er almikil. Á fremstu síðu í nevndu Dimmu finst stór lýsing:

*"Frimærker købes!*
*Til højeste Priser købes 5 Øres Frimærker, overstemplede til 2 Ø. I Thorshavn.*
*Frimærkebørsen, København."*

Og á síðu 3 í somu Dimmu er onnur eftirlýsing undirskrivað Johs Olaus Joensen, Tórshavn.

Seinni skrivar Tingakrossur Nr. 3 tann 22. januar 1919 hesa heldur skemtiligu grein:

*Frímerki – "epedemi".*
*"Postmenn okkara hava havt nógv at gera í seinastuni av frímerkjasamlarum, sum "spekulera" í 2– oyra – stempladum 5 – oyra frímerkjum – 2- oyra merkini eru langt síðani uppi. Fyrr vóru tað mest smádreingir, ið fingust við henda løgna vinnuveg her hjá okkum, men nú eru vaksnir menn – ein blaðstýrari sum harðast! – komnir upp í leikin og senda heilar brævdungar á posthúsið við teirra egna navnið á. Vinning vænta teir óføran: tað sigist at eitt 2- oyra-stemplað merki brátt kann verða 50 Kr.!*

*Eitt stuttligt dømi um hesa frímerkja "epedemi" er "premiu–gátan", sum "Dimma" hevur sett út til lokkudorg. Hon er so greið, at hvørt barn kann gita hana, men júst tí kann blaðstýrarin vænta sær loysningar í hópatali – við 2- oyra- stemplaðum frímerkjum uttaná! Og tað er tað, ið umræður.*

*Stundum verða tó "spekulantarnir" lumpaðir. Ein álvarsmaður – so sigur søgan – kom um dagarnar inn á posthúsið við eini rúgvu*




*Godskesen Andersen, postekspedientur á posthúsinum*




*4 oyra krossband. Mynd: Peter Sondhelm*

*av brøvum, ið øll vóru til hann sjálvan! Postmaðurin legði eitt krossband um rúgvuna, setti eitt 50-oyra merki á – og flýddi manninum brøvini aftur. Hann bannaði við!"*

Jú, frímerkjaspekulantar vóru har, og í dag eru tað nógvir savnarar, sum meta lítið ella einki um brævbjálvarnar, har tilskriftin er "P S Johannesen, Vaktarhúsgøta". Sum verða man, tí øll vita, at Petur Sofus Johannesen var stórsavnari; men mær er so fortalt, at P S ongantíð fór inn á posthúsið at biðja um ávísa stempling – brøvini fóru altíð í postkassan, so var restin upp til postverkið – og gáar tú eftir tí, so finnast t.d. hansara brævbjálvar í ógvuliga ymiskari stempulgóðsku.

Og fleiri enn so eru brøvini ikki – so neyvan gera tey nakran skaða; heldur øvugt.

*Álvur Danielsen*

Keldur


- "Færøernes interimistiske frigørelsesmidler 1919" af Kristian Hopballe og Steffen Riis. 1986.
- Ingvard Jacobsen, greinskrivari í Norðatlantex – 76.
- Aage Tholl og Rowland King-Farlow skjøl/ samskifti 1950 -1970.
- Rættlestur: Poul Erik Malmbæk




Royndarprent




# V.U. Hammershaimb 200 ár

Í hvørji tjóð eru menniskju, ið fáa so stóran týdning, at trupult er at taka samanum teirra langa lív og ómetaliga stóra virksemi og enn minni ta broyting, ið tey skaptu fyri fólkið, mentanina og landið.

Ein tílíkur maður var Venceslaus Ulricus Hammershaimb (1819-1909), í vanligari talu róptur V. U. Hammershaimb ella bara Hammershaimb.

Orsakað av sínum mongu málsligu, bókmentaligu og mentanarligu avrikum gjørdist hann uttan samanbering týdningamiklasti persónurin í føroyskum mentanarlívi í 19. øld.

Sum mentamaður, málgranskari, embætismaður og sum próstur, var hann við til at gera føroyska skriftmálið.

Hann savnaði og gav út fólkaminni føroysku tjóðarinnar, føroyskar vísur, orðatøk og annan mentanararv.

**Gudfrøðingurin Hammershaimb**

Ungi Hammershaimb gjørdist studentur í 1839 í Keypamannahavn, Síðani læs hann gudfrøði við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn og gjørdist lutherskur prestur, men hann metti norðurlendska málgransking (filologi), sum rætta kall sítt.

Hann var føddur í Sandavági. Eftir loknan lestur gjørdist hann sóknarprestur, fyrst í Norðstreymoy, síðani í Eysturoy og síðani próstur í Føroyum.

Til hann flutti úr Føroyum í 1878 til embæti í Danmark, var hann kongsvaldur limur í løgtinginum.

**Útgevarin og innsavnarin Hammershaimb**

Í fyrstu skriftum sínum skrivar Hammershaimb um síni stóru mál og dreymar, sum eru at bjarga teimum fornminnum, ið enn finnast sum gamlar leivdir í málinum, kvæðunum og í sagnum, ið liva á tungu føroyinga.



Málningur av V.U. Hammershaimb. R. Kjellerup, 1899



*Hesin minnisvarðin varð reistur í 1919 í Sandavági.*
*Mynd: Ole Wich.*

Her fór hann undir tað, sum seinni skuldi gera hann navnframan og sum gjørdist veruliga lívsverk hansara.

Frá mitt í 1840'unum gav hann út greinar um skaldskap av mannamunni, sum hann hevði savnað inn á fleiri ferðum í Føroyum. Hesar greinar vórðu m.a. givnar út í donskum tíðarritum.

**Risin og kellingin**

Á 17,- kr frímerkinum sæst elsta kenda andlitsmyndin av Hammershaimb. Í bakgrundini á frímerkinum síggjast eisini Risin og Kellingin sædd úr Tjørnuvík.

Eisini er eitt brot úr søgnini um Risan og Kellingina. "Risi og Kelling" innsavnað av Hammershaimb og prentað í danska tíðarritinum "*Annaler for Nordisk Oldkyndighed og Historie*" í 1846 og givið út av Det Kongelige Danske Oldskriftselskab.

**Hammershaimb sum endurnýggjari av skriftmálinum**

Føroyingar minnast serliga Hammershaimb, sum tann, ið endaliga evnaði til føroyska skriftmálið.

Útgávan hjá Hammershaimb av føroyska skriftmálinum við t.d. bókstavinum "ð", varð gjørd við íblástri frá málfrøðingum tá í tíðini, ið allir vóru upptiknir av íslendskum máli og bókmentum.

Tað var eisini í hesum umhvørvi, at Hammershaimb skrivaði sínar fyrstu greinar, m.a. eggjaður av eini røð av lærdum dønum.

**Tann stóra finalan – Færøsk Antologi 1891**

Útgávuvirksemið kom í hæddina við verkinum *Færøsk Anthologi* frá 1891, ið sæst á 11,- kr. frímerkinum.

Hetta veldiga verk inniheldur bæði ein søguligan og málsligan inngang, orðasavn




*Færøsk Antologi 1891. Mynd: Ole Wich.*

og yvirlit, umframt tey týdningarmiklastu kvæði, fólkavísur, sagnir og orðatøk, ið finnast í Føroyum. Tey flestu av hesum stava úr søvnum hjá Hammershaimb sjálvum.

Í hesum veldiga verki lýsir Hammershaimb siðir og siðvenjur hjá vanliga fólkinum, mentanarliga ríkidømið og viðurskiftini hjá fólkinum til land og náttúru. Hesar fólkalívsmyndir komu at ávirka føroyskar fagurbókmentir heilt upp til okkara dagar, og *Færøsk Antologi* gjørdist sostatt eitt vegamót í tjóðarinnar samleika.

Upprunahandritið til "Fortale" í Færøsk Antologi sæst sum bakgrund á smáarkinum, og har í teim fyrstu linjunum finna vit aftur mál og dreymar ungdóms hansara, ta somu yvirlýsingina.

**Mentanarligi týdningur Hammershaimbs**

Í 1893 vitjaði Hammershaimb Føroyar fyri seinastu ferð og fekk hann tá eina hjartaliga móttøku. Enn minnast føroyingar í stóran mun Hammershaimb. Flestu føroyskir rithøvundar kring næstseinasta aldamót hava skrivað yrkingar honum til heiðurs.

Í 1919 varð fyrsti minnisvarðin reistur í Sandavági, heimbygd hansara; seinni, í 1948, kom ein annar minnisvarði í Havn. Hesin gjørdist heldur ikki tann seinasti.

Í 1980 gav Postverkið út eitt frímerki av V.U. Hammershaimb og hann prýddi føroyska hundraðkrónuseðilin í fleiri áratíggjur.

*Kim Simonsen, ph.d. og mag.art.*



Royndarprent




# Mánalendingin 1969

*"Houston, Tranquility Base here. The Eagle has landed."*

Soleiðis ljóðaðu boðini yvir samskiftiskervið hjá NASA. Klokkan var 20.17 UTC, sunnukvøldið tann 20. juli 1969. Astronautarnir Neil Armstrong og Buzz Aldrin, høvdu, eftir spennandi og skakandi innflúgving, sett lítla mánafarið "Eagle" á Mánan, meðan milliónir av sjónvarpshyggjarum og útvarpslurtarum her niðri á jørðini, endiliga kendu tað lætna fyri ondini. Mannaættin var fyri fyrstu ferð umboðað á einum øðrum himinknøtti.

*"Mánaferðin er endað, teir standa á mánanum. Armstrong er púra róligur og sikkur – og í kontrollrúminum í Houston eru menn heldur ikki serliga uppøstir. Nú er mánaferðin endað, nú stendur rúmdarfarið á Mánanum...."* Føroyingar høvdu ikki sjónvarp um tað mundið – og hóast okkurt einstakt hús hevði fingið eitt annars óvirkið sjónvarpstól at virka so frægt, at húsfólkið kundi hóma hendingina gjøgnum statiskt brús á skerminum, vóru ikki líkindi at taka ímóti antennusignalum frá grannalondunum. So her sótu høg og lág, gomul og ung við útvarpstólini og lurtaðu, meðan ungi journaliststudenturin, Jógvan Arge, segði frá í beinleiðis sending úr einari studiohøll hjá Danmarks Radio í Keypmannahavn. Útvið 18 tímar sat Jógvan Arge í hølunum á Rosenørns Allé og fylgdi gongdini, líka til løtuna, klokkan 2.56 UTC (sum samsvarar føroyska tíð), tá Neil Armstrong setti vinstra fót á mánan og mælti tey kendu orðini: *"That's one small step for man, one giant leap for mankind!"*

Á Bryggjubakka sótu útvarpsstjórin Niels Juel Arge og journalisturin Finnbogi Ísakson og fylgdu gongdini. Útvarp Føroya gjørdi nógv burturúr hendingini – og hevði frammanundan gjørt ymisk innsløg, ið øll høvdu við mánan at gera. Millum annað helt Hans Sundstein ein fyrilestur um mánan og




*Partur av málninginum "The seagull has landed" eftir Edward Fuglø.*

streymviðurskifti. Kendi danski sjónvarpsmaðurin, Jacob Nielsen, var í Føroyum um tað mundið og hann veitti stuttar samandráttir av gongdini á donskum, til teir danir ið tá búðu í Føroyum.

Fjart frá Houston og langt undir mánanum, var við at vera songartíð hjá fýra ára gamla klaksvíksdronginum, Edward Fuglø. Hann hevði varnast spenningin millum tey vaksnu og hoyrt frásagnirnar í útvarpinum dagin á tamb og út á kvøldið. Hóast hann ikki heilt skilti týdningin av hóvastákinum, sum tey vaksnu vóru so upptikin av, kendi hann á sær, at onkur stórhending stóð fyri framman. Brádliga var tað sum um spenningurin loystist – pápi hansara, Jens, lyfti smádrongin upp av gólvinum, fór til eitt vindeyga við honum og peikaði upp móti hválvinum, meðan hann segði frá um menninar, sum júst høvdu lent á mánanum.

Tað gjørdist eitt av fyrstu barnaminnum hjá listamanninum Edward Fuglø – og her, 50 ár eftir at hendingin fór fram, hevur hann avmyndað gandakendu løtuna á minningarmerkinum fyri søguligu ferðina hjá Apollo 11, tá Armstrong og Aldrin vitjaðu gamla fylgissveinin hjá jørðini.

Og rúmdarferðir og astronautar eru eitt av mongum listarligum myndevnum hjá Edward Fuglø. Fyri nøkrum árum síðani málaði hann ein níggju metur langan satiriskan málning við heitinum *"The Seagull Has Landed"*, har ein astronautur setur føroyska flaggið á mánan, meðan aðrir dansa føroyskan dans á mánaskorpuni. Hóast innhugsin og heldur glað fyri gamlan siðaarv, so hava flest okkara eitt sindur av einum rúmdarfara í vitskuni.

Og tað er eitt eyðkenni fyri tey flestu av okkara ættarliði, sum vuksu upp, tá kappingin gekk sum harðast at senda fólk út í




*Partur av málninginum "The seagull has landed" eftir Edward Fuglø.*

rúmdina og at verða fyrstur upp á mánan. Sjálvur var eg 10 ára gamal, tá Armstrong og Aldrin lendu har uppi – og minnist væl løtuna har heima í køkinum, sum var tað í gjár.

Tað var eitt ævintýr, ið veruliga megnaði at fanga hugflogið hjá okkum børnum. Vit vistu alt um rúmdarferðirnar, kendu nøvnini á teimum ymsu astronautunum og høvdu hollan kunnleika um hvat hvør teirra hevði framt. Danski tyggigummiframleiðarin DANDY, gjørdi í sekstiárunum "Bubble Gum" pakkar við samlimyndum frá rúmdarprogrammunum. Tyggigummipettini smakkaðu onki serligt, men hvør pakki hevði fýra rúmdarmyndir við upplýsingum á baksíðuni. Vit býttu um samlimyndir í fríkorterunum og tosaðu við serkunnleika um rakettsøgu, líka frá fornum kinesiskum fýrverki til risastóru Saturn rakettirnar, sum vórðu nýttar í endaligu Apollo røðini.

Mercury, Gemini og Apollo – fantastisk heiti, ið gjørdust partur av okkara alheimi í barnaárunum. Rúmdargongur, samankoblingar, tey villastu óhappini og onkrir sorgarleikir. Vit vuksu upp í skugganum av hetjum sum Yuri Gagarin, Alan Shepard, John Glenn, Valentina Tereshkova, Alexey Leonov, Edward White og, ikki minst Neil Armstrong og Buzz Aldrin. Astronautar og kosmonautar, teirra nøvn og brøgd hava enn í dag ein serligan sess í hugans myndaskála.

Fyri mong okkara eru orðini: *"Houston, Tranquility Base here. The Eagle has landed,"* sjálv ímyndin av størsta bragdi, ið manna ættin nakrantíð hevur framt.

*Anker Eli Petersen*










Royndarprent

# Europa 2019: Teisti

Tað eru ongantíð gjørdar nágreiniligar kanningar í Føroyum av teista, sjálvt um tað er ein eyðkendur fuglur, sum sæst nær landi á øllum 18 oyggjunum. Teistin er álitisfullur og sæst ofta sera tætt við land – ja, ofta inni í havnum og ofta nakrir fáir saman. Elsti teistin mann veit um, er ein svenskur teisti, sum varð fangaður 29 ár og 11 mánaðir eftir at hann varð ringmerktur.

**Ættin**

Føroysku álkufuglarnir *(Alcidae)* fevna um lomvigu, álku og lunda, sum eru flytifuglar í Føroyum og teista, sum er støðufuglur, umframt tey bæði sløgini íslandslomvigu og fullkubba, sum vitja Føroyar. Teistaættin *Cepphus* fevnir um tilsamans trý sløg, sum eru býtt sundur í ellivu undirsløg. Ættin *Cepphus grylle*, sum føroyski teistin hoyrir til, er í Norðuratlantshavi og Eystrasalti býtt sundur í fimm undirsløg.

Undirslagið sum er í Føroyum, er *Cepphus grylle faeroeensis*, og hesin eigur bert í Føroyum.

**Útsjónd**

Teistin verður ikki mistikin fyri annan sjófugl í Føroyum. Frá nevi til vel er hann 32-38 cm. Hann hevur eitt veingjabreiði upp á uml. 55 cm. Teir sera vøkru gomlu teistarnir eru um summarið heilt svartir við hvítum veingjaspegili og blóðreyðum beinum. Um heystið verða teir fjaðursárir og fjaðurhamin gerst meiri gráur, tó hvítur um búkin. Um veturin hevur hann framvegis tann snjóhvita veingjaspegilin. Pisan við gráa fjaðurhaminum líkist gamla teistanum í vetrarbúna, men líkist frá við at hava svartar blettir í hvíta veingjaspegilinum. Blettirnir í veingjaspegilinum hevur pisan bert fyrsta árið. Uttan sæst ongin munur á bøguni og steggjanum, men steggin er ofta tann størri fuglurin um eitt teistapar sæst saman.



*Teisti. Mynd: Jógvan Hansen.*

**Yngul**

Teistin byrjar at yngla, tá hann er millum tvey og fýra ár. Hann ger sær reiður í rivum í berginum og undir steinum í smáum urðum. Ofta yngla pørini einsamøll, men onkuntíð kunnu smá bøli av teistum síggjast í grótkastinum í ymsum havnum, men altíð á støðum, sum eru væl vard fyri rovfuglum. Reiðrið kann verða tætt við sjóvarmálan ella langt uppi í berginum. Eggini bæði eru ljós, heilt ljósagrá við myrkum og ljósum blettum og tey liggja beint á jørðini. Báðir fuglarnir bøla og bølingartíðin er uml. 28-31 dagar. Teistin er einasti norðuratlantiski *(Paleoarctic)* álkufuglur, sum fær tvær pisur. Pisurnar eru uml. 37 dagar í reiðrinum áðrenn tær fara á sjógv. Størsti fíggindin hjá teistanum er rottan, sum er á 7 av 18 oyggjum í Føroyum.

**Føði**

Teistin fær føði sína í taranum tætt inni við land. Hann sæst ofta við tarabrosmu í nevinum, men etur eisini annan fisk og smá krabbadýr. Hann dugir væl at laga seg eftir umstøðunum, tá hann skal finna sær føði og skiftir skjótt frá einum fongi til annan. Hetta er eisini ein av orsøkunum til at føroyski teistastovnurin hevur tað gott í mun til aðrar føroyskar sjófuglar,  sum eru bundnir at nebbasild.

**Teistin fyrr og nú**

Í 1863 skrivar sýslumaðurin H.C. Müller hetta: *"Førhen var den meget talrig men på Grund af dens Troskyldighed er den nu meget formindsket paa de fleste Steder, da man ikke længer agter den gamle Forkjærlighed for Teisten, hvorefter det ansaaes for Synd at dræbe den. I Slutningen af juli komme Ungerne paa Søen og kunne da slaaes ihjel med en Aare. Den spises gjerne, og Ungen „Tajsta-Pisa" ansees for en Lækkerbidsken".*

Í 1920'unum var teistin nærum týndur í Føroyum, og hetta førdi til at teistin í 1928 varð friðaður í tíðarskeiðnum frá 1. mars og

til seinast í august. 9. september í 1954 varð teistin friðaður alt árið og í dag telur stovnurin uml. 3000 til 4000 pør. Í Nólsoy eru uml. 150 pør.

Einans 117 teistar eru ringmerktir, men hóast tað, so er tað onki, sum týðir á at teir fara úr Føroyum um veturin. Møguliga fara framtíðar kanningar at vísa nakað annað.

*Jens-Kjeld Jensen*



## Vilt tú hoyra málið í teistanum, sum er avmyndaður á ársins Europa frímerkjum?

## Tað ber til! Forvitin?



1. TAK NIÐUR CEE APPINA Í APP STORE ELLA GOOGLE PLAY
2. SKANNNA FRÍMERKJAMYNDINA
3. NJÓT FUGLASONGIN!











Royndarprent




# Myllur í Føroyum

**Føroyska vatnmyllan**

Í 19. øld gjørdist lítla vatnrætta vatnmyllan ein týdningarmikil partur av føroyska mentanarlandslagnum, og sást allastaðni í føroysku bygdunum. Seinast í 19. øld var tíðin hjá hesi mylluni tó farin og hon varð gloymd – líka so brádliga, sum hon kom. Ikki setti hon stór spor eftir seg hvørki í yrkingum, føgrum bókmentum ella í málningalist.

Fyrstu ferð vatnmyllur í Føroyum eru nevndar í bókmentum, er í staðfrøðiligu (topografisku) lýsingini hjá Jens Christian Svabo av Føroyum í 1781-1782. Svabo visti bara um níggju myllur, men helt at fleiri áttu at verið bygdar og at bygdafólkini áttu at gingið saman um tílík tíðarsparandi tiltøk.

Seinni sær út til at fleiri myllur verða bygdar. Í staðfrøðiligu lýsingini hjá Jørgen Landts frá ár 1800 verður ført fram, at tað nú eru tjúgu myllur í Føroyum, men at tað "áttu at verið enn fleiri".

Ikki fyrr enn hjá danska topografinum og fornfrøðiliga áhugaða offiserinum Daniel Bruun, sum m.a. hevur givið okkkum nakrar fínar tekningar av vatnmyllum frá fyrstu vitjan síni í 1896, finst ein verulig siðsøgulig viðgerð av føroysku vatnmylluni. Haraftur-at kundi Bruun upplýsa at ein sovorðin vatnmylla kundi mala "eina til tvær tunnur av korni um dagin" og at tað ofta vóru fleiri brúkarar um eina tílíka.

Stóri vøksturin av vatnmyllum í Føroyum í 19. øld, hevur helst samband við at kornframleiðslan vaks í tíðini rundan um Napoleonskríggini fyri síðani at minka aftur umleið 1850. Eftir hetta hendir so ein ógvusligur vøkstur, sum kemur í hæddina uml. 1880. Danski tjóðlívsfrøðingurin, Bjarne Stoklund hevur møguliga rætt, tá hann setur vøksturin í talinum av sornhúsum og vatnmyllum í seinnu helvt av 19. øld í samband við stóra vøksturin av føroysku kornframleiðsluni.



*Vatnmylla í Froðba. Tekning: Daniel Bruun 1896*

Møguliga er minkingin í byggframleiðsluni og ein øktur innflutningur av mjøli orsakað av betri flutningsmøguleikum úr Danmark orsøkin til at vatnmyllan brádliga hvarv úr føroyska mentanarlandslagnum seint í 19. øld.

Myllurnar hava neyvan verið knýttar at kongsgørðunum, men eru heldur eitt dømi upp á samstarv millum ymiskar brúkarar. Tað hevur verið ein bíligur bygningur at gjørt, tilfarið var mestsum bara grót og viður. Til sjálva myllufunktiónina kravdist eitt t-skapað jarnpetti, ið kundi samanbinda snúningsbløðini við ein fals í niðaru síðuni av ovara mylnusteininum (yvirsteininum). Eitt sovorðið kundi smíðast lokalt.

Tað einasta, sum mátti skaffast uttanífrá og gjaldast við peningi, vóru sjálvir mylnusteinarnir, tí føroyska basaltið dugir ikki til mylnusteinar. Teir mongu mylnusteinarnir, ið enn eru varðveittir í fleiri føroyskum bygdum eru í flestu førum gjørdir úr skifuri, sum riggar væl til mylnustein. Hetta grótslagið finst ikki náttúrliga í Føroyum og hesir steinar eru tí framleiddir uttanlands og innfluttir til Føroya.

Svabo var av teirri áskoðan at tann vatnrætta myllan var eitt fyribrigdi, sum hevði røtur langt afturi í Føroya søgu. Mylluteknikkurin var væl kendur í Rómverjaríkinum og breiddi seg norðureftir á evropiska meginlandinum í øldunum fram móti víkingaøld. Men hetta var ikki tann vatnrætta, men tann loddrætta myllan.

Vatnrætta myllan er fornfrøðiliga skjalprógvað í Írlandi umleið ár 700 e.Kr. og í Orknoyggjum er grivið út eitt mylluvirki frá víkingaøld. Um so er at mylluteknikkurin longu var í Føroyum í víkingaøld, so má roknast við at hann er komin her við niðursetufólkum úr bretsku oyggjunum og Írlandi.



*Varðveitt og friðað mylla á Skarvanesi. Tað var ikki uttan orsøk at Bjarne Stoklund lýsti ta føroysku mylluna sum "ikki nógv størri enn eitt stórt klædnaskáp". Mynd: S. Stummann Hansen.*

Staðfestingin av føroysku vatnmylluni í Føroya søgu kemur í dag til sjóndar í eini røð av væl varðveittum, umvældum ella endurbygdum myllubygningum ymsastaðni í Føroyum, í staðarnøvnum umframt mylnusteinum, sum ymsastaðni eru at síggja sum prýði í nútímans urtagørðum.

**Daniel Bruun**

Daniel Bruun (1856-1931) vitjaði Føroyar í alt seks ferðir (1896, 1897, 1905, 1912 og 1914). Hann gjørdi herkanningar í norðbúgva' toftunum í Grønlandi í 1894, helt áfram í Íslandi í 1895 og kom so til Føroya í 1896. Hann vitjaði sum sagt Føroyar fleiri ferðir og eisini vitjaði hann fleiri ferðir í Íslandi. Bruun – sum var útbúgvin heryvirmaður, offiserur – hevði heilt frá ungdómsárum sera stóran áhuga fyri norðbúgvum í Grønlandi, og hesin áhugi førdi so til kanningar av byggisiðunum í útnorði. Vitjanin í 1898 var í samstarvi við Nationalmuseet í Keypmannahavn fyri at fyrireika eina serliga útnorðurdeild til stóru heimsframsýningina í Paris í 1900. Hetta gjørdi Bruun og skapti harvið altjóða uppmerksemi um mentanirnar í útnorði.

Bruun gav í 1929 út tann stórfingna klassikaran *"Fra de færøske Bygder"* (við styttri fyrireikingum í 1904 og 1911). Árið fyri gav hann út eina líknandi bók um Ísland.

Tekningarnar hjá Bruun av teimum báðum vatnmyllunum, í ávikavist Sandágerði og Froðba, sum eru myndevni á frímerkjunum, verða goymdar saman við øðrum tekningum hjá Bruun á Danmark Nationalmuseum.

Frímerkini eru graverað av viðurkenda listamanninum og gravørinum Martin Mörck.

*Steffen Stummann Hansen, fornfrøðingur*

# Postgjøld 01.01.2019

## Brævastøddir

| Smábrøv | Stórbrøv | Brævpakkar |
|---|---|---|
| 23 x 17 x 0,5 cm<br>í mesta lagi | 23 x 33 x 1 cm<br>í mesta lagi | Longd + breidd + tjúkd<br>í mesta lagi 90 cm |
| 23 x 17 cm<br>0,5 cm tjúkt | 23 x 33 cm<br>1 cm tjúkt | <br>l + b + t<br>= 90 cm |

## Innanoyggja brøv

| Vekt | Smá-brøv | Stór-brøv | Bræv-pakkar |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 11 kr | 17 kr | 35 kr |
| 51 - 100 g | | 17 kr | 35 kr |
| 101 - 250 g | | 27 kr | 35 kr |
| 251 - 500 g | | | 35 kr |
| 501 - 1000 g | | | 55 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 63 kr |

## Evropa og útheimur

***A-brøv***

| Vekt | Smá-brøv | Stór-brøv | Bræv-pakkar |
|---|---|---|---|
| 0 - 50 g | 19 kr | 26 kr | 71 kr |
| 51 - 100 g | | 26 kr | 71 kr |
| 101 - 250 g | | 44 kr | 71 kr |
| 251 - 500 g | | | 71 kr |
| 501 - 1000 g | | | 108 kr |
| 1001 - 2000 g | | | 208 kr |

**Innskrivað bræv:** 50,00 kr. + postgjald.

Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · stamps@posta.fo · www.posta.fo

# Nýggjar útgávur 29. apríl 2019



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **V.U. Hammershaimb 200 ár** |
| Útgávudagur: | 29.04.2019 |
| Virði: | 11,00, 17,00 og 19,00 kr. |
| Nummar: | FO 906-908 |
| Stødd, frímerki: | 30 x 40 mm |
| Stødd, smáark: | 85 x 122 mm |
| Listafólk: | Ole Wich |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og stórbrøv, 0-50 g, og smábrøv til útheimin, 0-50 g. |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Mánalendingin 1969** |
| Útgávudagur: | 29.04.2019 |
| Virði: | 17,00 kr. |
| Nummar: | FO 909 |
| Stødd, frímerki: | 30,81 x 44 mm |
| Listafólk: | Edward Fuglø |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Stórbrøv innanoyggja, 0-50 gr. |





Royndarprent


+ sjálvklistrandi hefti við 6 frímerkjum

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Europa 2019: Teisti** |
| Útgávudagur: | 29.04.2019 |
| Virði: | 19,00 og 26,00 kr. |
| Nummar: | FO 910-911 |
| Stødd, frímerki: | 40 x 30 mm |
| Listafólk: | Astrid Andreasen |
| Prentingarháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv og stórbrøv til útheimin, 0-50 gr. |





Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Myllur í Føroyum** |
| Útgávudagur: | 29.04.2019 |
| Virði: | 11,00 og 35,00 kr. |
| Nummar: | FO 912-913 |
| Stødd, frímerki: | 43 x 31 mm |
| Listafólk: | Daniel Bruun |
| Gravørur: | Martin Mörck |
| Prentingarháttur: | Offset / gravura |
| Prentsmiðja: | La Poste, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv innanoyggja, 0-50 gr. og brævpakkar til útheimin 101-250 gr. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Teisti. Myndatøka: Jógvan Hansen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

/faroestamps